# Tólv nýggir slóðarar

**Venjararnir, sum nú hava lokið prógv, kunnu halda fram og útbúgva seg á hægsta europeiska støðið, sum um fimm ár verður krav, at allir venjararnir í føroysku 1. deildini hava lokið**

FÓTBÓLTSVENJARAR
*Jóannes Hansen*



*Teir tólv venjararnir, sum júst hava lokið B-útbúgvingina. Aftanfyri frá vinstru: Hans Mourits Foldbo, skeiðleiðari, Magnus á Stongum (EB/Streymur), Jógvan Páll Joensen (SÍ), Piotr Krakowski (EB/Streymur), Krzystof Popczynski (GÍ), Jens Martin Knudsen (NSÍ), Pól F. Joensen (TB) og Petur Simonsen, skeiðleiðari. Frammanfyri frá vinstru: Terji Hansen (AB), Milan Cimburovic (TB), Sveinbjørn Danielsen (Royn), Sámal Erik Hentze (B36), Eyðun Klakstein (KÍ) og Bergur Hansen (NSÍ).*

Mikukvøldið í síðstu viku vóru tólv fótbóltsvenjarar, sum koma úr feløgum kring alt landið, lidnir við B-venjaraútbúgvingina hjá FSF. Seinasti parturin av útbúgvingini verður nevndur Slóðarin, venjararnir fóru undir henda partin av útbúgvingini í mars í ár.

Talan er um útbúgving, sum bæði hevur verið verklig og ástøðilig ella teoretisk. Venjararnir hava staðið fyri venjingum, og teir hava eygleitt, hvussu hinir, sum teir hava útbúgvið seg saman við, hava lagt til rættis. Teir hava arbeitt við skrivligum uppgávum, teir hava kjakast um venjing og fótbólt, og teir hava fingið frálæru frá instruktørum. Ábyrgdarpersónar fyri venjaraskeiðnum hava verið Hans Mourits Foldbo og Petur Simonsen.

Tað er Fótbóltssambandið, sum stendur fyri og hevur ábyrgdina av føroysku venjaraútbúgvingini, sum verður hildin sambært UEFA ásetingum og krøvum. Tað ber við sær, at venjarar, sum hava nomið sær útbúgving í Føroyum, eisini eru kvalifiseraðir at vera venjarar aðra staðni enn í Føroyum.

FSF bjóðar nýklæktu slóðarunum at halda fram at útbúgva seg. Í september er møguleiki hjá teimum at fara til próvtøku, sum gevur teimum venjarabræv ella license á UEFA B støði. Tá ið venjararnir hava staðið hesa próvtøkuna, kunnu teir fara undir A venjaraútbúgvingina. Í heyst fer FSF fyri fyrstu ferð undir A-venjaraútbúgvingina.

Í UEFA høpi verða venjaraútbúgvingarnar raðfestar høgt, og harvið verður eisini kravt, at limalondini í UEFA raðfesta útbúgvingarnar. Krøvini gerast alt strangari, og nú er greitt, at teir, sum frá og við 2010 skulu vera venjarar í 1. deild í Føroyum, skulu hava lokið A-venjaraútbúgvingina.

# Kappsvimjing um fjørðin á jóansøku

**Á jóansøku verður ein gamal siður tikin uppaftur. Tvøroyrar svimjifelag skipar fyri kappsvimjing um fjørðin sunnudagin á jóansøku og aftaná verður togtogan millum luttakararnar.**



Teinurin ið svomið verður er frá nýggju samferðslukeiini í Øravíkarlíð yvir til kaiina við flakavirkið. Hesin teinur er um 700 metrar. Byrjað verður sunnudagin kl. 13.30 og luttakararnir skulu møta kl. 13.00.

## Gamal siður

Tað at svimja kapp á sjónum er gamalt í Føroyum og hóast tað ikki hevur verið svomið kapp á sjónum á jóansøku seinastu 30 árini, so mugu vera mong ið minnast tað við fragd. Ikki minst var togtoganin millum svimjarar har eina liðið var á molanum og hitt á keiini nakað í áskoðarunum dámdi væl.

Fyri nøkrum árum síðani skipaði Svimjifelagið Flot fyri kappsvimjing um Skálafjørðin á skálafjarðarstevnuni. Tað ferðina vóru luttakararnir gott 30, bæði menn og kvinnur ung og gomul. Síðani tá hava ikki verið kappingar á sjónum við undantakið av svimjingini um Nólsoyarfjørð. Tann teinurin er um 5.000 metrar og sostatt í longra lagið fyri tann, ið ikki venur miðvíst.

## Kapping fyri øll

Á jóansøku er ætlanin at øll kunnu luttaka, og tað kostar einki, eins og teinurin uppá 700 metrar ger tað møguligt hjá flestu svimjarum at luttaka.

Treytirnar ella reglurnar eru fáar: svimjararnir skulu vera í vátdrakt og tað er ikki loyvt at nýta fitjur. Steyp verða latin. Tilmelding kann fara fram til 24. juni kl. 20.00 hjá Johan Martin Poulsen á telefon 280607 ella mail jm_poulsen@yahoo.dk.